## Fólk til reingerð



*Vit sóknast eftir fólki til reingerð at byrja skjótast gjørligt.*

*Nærri fæst at vita við at venda sær til Janus Norðberg á tel 47 77 77*

Kloosterboer Terminal Faroe Islands
www.kloosterboer.fo



## 2 trukkførarar



*Vit sóknast eftir 2 trukkførarum við prógvi, at byrja beinanvegin.*

*Nærri fæst at vita við at venda sær til Janus Norðberg á tel 47 77 77*

Kloosterboer Terminal Faroe Islands
www.kloosterboer.fo



## Alt til gosbaði

Sóttreinsievni 2, 5 l............ 399 kr
Sóttreinsievni 125 ml.............95 kr
Klortablettir fyri. Stk ................2 kr
Skúmdempari 1 l ................447 kr
Bonivoks 1 l........................429 kr
Filturreinsievni 1 l ................315 kr
Vatnangi fýr 250 ml..............198 kr
Vatnangi eucal. 250 ml.........198 kr
Njóti gosbaði enn meiri, við rætta tilhoyrinum.

Rør & Blikk
Tlf.: 322 999 , fart.: 225 345
www.rorblikk.fo


# Hús í Kollafirði til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða hús seld í Kollafirði.

Húsini standa í Líðini, sum er veðurgott og barnavinarligt umhvørvi. Húsini eru bygd í 1986, eru í góðum standi og í tveimum hæddum, 116 $m^2$ hvør hæddin. Miðhæddin er innrættað soleiðis: køkur, 2 stovur, tvey trin niður til aðra, 3 kømur, baðiverilsi og bryggers. Stór altan er um húsini. Í kjallaranum er eitt kontór, restin av kjallaranum er ikki innrættað. Stykkið er 1040 $m^2$. Nýtt tak verður lagt á.

Áhugað kunnu síggja húsini eftir avtalu. Setið tykkum í samband við okkum á **tlf. 421095.**

# Frá Hvalbiar skúla

Søkt verður eftir lærara til skúlaárið 2001/2002.

1 parttíðarstarv 16 tímar.

Starvið sum er tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2001, verður sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1. til 27.4.

Umsóknirnar við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 9. juli 2001.

**Hvalbiar Skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba

# Lærlingur til bileykalutagoymslu søkist

Til spennandi læruupláss bileykalutagoymslu okkara, verður søkt eftir ungum ágrýtnum fólki, beinanvegin ella aftaná summarfrítíðina.

Set teg í samband við Carsten ella Derek, ella send skúlaprógv og møguligt viðmæli til

P/f D. B. Bilar
J. Bronckgøta 15
100 Tórshavn
Tlf. 310 600

# Seminar um Opinberingina

Leygardagin 30.6.2001 verður seminar við Ed Brancamp, USA. Hann og konan hava verið trúboðarar í eysturevropa í umleið 10 ár og eru búsitandi í Letlandi. Seminarið verður um Opinberingina og byrjar kl. 09.00 og endar umleið kl. 14.30. Kostnaður fyri seminarið er kr. 125,00 fyri hvønn, matur íroknaður. Tilmelding á tlf. 449162, 219162 ella 448342. Síðsta freist fyri tilmelding er 28. 06.2001.

**Lívsins Orð**

# Pedagogur

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Sambýlinum í Turiðargøtu 25, er eitt tænastumannastarv sum pedagogur leyst at søkja frá 01.08.2001 ella eftir avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Uppgávan er at arbeiða við fólkum við serligum tørvi og arbeiðstíðin fevnir um dag/kvøld/nátt og vikuskiftisvaktir.

Sambýlið er undir uppbyggjan og vænta vit at tú verður við til at skapa eitt trygt og mennandi umhvørvi saman við bú- og starvsfólkum. Starvið krevur at viðkomandi umsøkjari er opin fyri at síggja møguleikar ístaðin fyri forðingar í tí pedagogiska arbeiðinum.

Í løtuni búgva 2 fólk á sambýlinum, men er ætlanin at 3 fólk skulu flyta inn afturat í nærmastu framtíð.

Starvið er ætlað pedagogi, men um ongin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið fyribils sett fólki við aðrari viðkomandi útbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Finn Larsen ella Onnu Dalsgaard á tlf. 321068.

Skrivlig umsókn við prógvi og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10.07.2001 og sendast til:

**Sambýlið í Turiðargøtu**
Turiðargøta 25
FO-100 Tórshavn

# Vágs skúli

Søkt verður eftir lærarum til skúlaárið 2001/2002.

- 2 størv fyri lærarar í farloyvi
- 1 parttíðarstarv

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2002 verða sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1. til 27.4.

Umsókir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 03.07.2001.

**Vágs skúlanevnd**
v/ Mariannu Eystberg
900 Vágur

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Laboratoriið á Landssjúkrahúsinum

Í tíðarskeiðinum 2. juli til 17. august 2001 verður laboratoriið opið

**mána- til fríggjadag kl. 08.00-09.30.**



# Sethús í Havn til sølu



Um hóskandi boð fæst selja vit sethúsini á Heygsmannavegi 9. Húsini eru í 2 hæddum og bygd í 1967. Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# Hús til sølu



Um hóskandi boð fæst, verða sethúsini í Onnugøtu 15 seld.

Áhugaði kunnu ringja á

**tlf. 315371 ella 257478**

# Søkt verður eftir

m/k at viðlíkahalda hava í summarmánaðunum m.a. at sláa plenu, lúka og annað fyrifallandi arbeiði.

Avger sjálv/ur arbeiðstíðina.

Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
**Bill.mrk. 2115**

# Frá S&K-felagnum

Vegna summarferiu er skrivstovan stongd frá mánadegnum 3. juli til mikudagin 1. august.

# Elektrikara lærlingur

Til el-innleggjaravirki okkara á Eiði søkja vit eftir lærlingi at byrja 1.august.

Tú fært eitt spennandi læruupláss við fjølbroyttum uppgávum, har tú møtir nýggjum avbjóðingum innan elektrikara handverkið.

Skrivlig umsókn við viðkomandi prógvum, skal sendast til: Petur F. Joensen, FO 470 Eiði.
Meira fæst at vita við at venda sær til Steinfinn Jacobsen tlf. 212 388.

**Petur F. Joensen**
góðk. el-innleggjaravirki
FO - 470 Eiði
tlf 42 33 88 fax 42 33 39

# Elektrikari

Til el-innleggjaravirki okkara á Eiði søkja vit eftir elektrikara at byrja 1.juli.

Tú skal saman við starvsfelagum arbeiða við bæði størri og smærri projektum, sum fevna um el-innleggingar til bygningar, virkir og skip.

Meira fæst at vita við at venda sær til Steinfinn Jacobsen tlf. 212 388.

**Petur F. Joensen**
góðk. el-innleggjaravirki
FO - 470 Eiði
tlf. 42 33 88 fax 42 33 39

# Pedagogur

Vit søkja eftir einum pedagogi fyri ein sum er farin í barnsburðarfarloyvi.

Starvið er 32 tímar um vikuna at byrja 13. august í eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum verður at senda til

**Sankt Josefs barnagarður**
Varðagøta 12
100 Tórshavn

**Í seinasta lagi 15. juli.**

Nærri fæst at vita á tlf. 312854.

# Tógvhandil til sølu

Tógvhandil í Miðvági til sølu.

**Tlf. 333355**
aftaná kl. 18.00

**Mentamálastýrið**

# Lærarar
## at undirvísa deyvum- og/ella hoyribrekaðum

Í Sernámsdeplinum eru 2 størv leys at søkja: 1 lærarastarv og eitt starv fyri lærara í farloyvi. Hesir skulu undirvísa deyvum- og/ella hoyribrekaðum børnum frá 1. august 2001 – fyribils á Venjingarskúlanum og/ella í Sernámsdeplinum. Eftir umstøðunum mugu umsøkjarar eisini vilja átaka sær aðra undirvísing. Setanarstaðið er fyribils Sernámsdepilin, men í sambandi við møguliga skipanarbroyting, mugu umsøkjarar góðtaka, at setanarstaðið kann verða flutt.

Eftir tørvi skipar Sernámsdepilin fyri skeiðum, herímillum teknmálsskeiðum. Umsøkjarar skulu luttaka í hesum skeiðum, bæði sum næmingar og síðan sum undirvísarar.

**Førleikakrøv**
- Lærarautbúgving
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Fyrimun hava umsøkjarar, ið kunnu undirvísa í – og á teknmáli, meðan onnur áhugað kunnu eisini søkja størvini – íroknað læraralesandi, ið fáa prógv í summar.

***Umsøkjarar, ið ikki hava teknmálskunnleika, skulu luttaka á umfatandi skeiðum longu frá skúlaársbyrjan.***

**Setanar- og lønartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Sernámsdepilin**
Á Frælsinum 32
Postrúm 2036
FO-165 Argir

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. juli 2001.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Eli Dahl í Sernámsdeplinum, tlf. 314522.

# Lærlingur til Seytjan!

Hevur tú áræði og hug til at gerast lærlingur í okkara fyritøku?

- hevur tú hug at arbeiða við móta og litum?
- ert tú røkin og fryntligur?
- ikki bangin fyri at taka tøk?
- umsøkjarin má hava FHS ella HH.

Um hettar hevur tín áhuga, skriva so okkum eina skrivliga umsókn innan 1. juli 2001.

**Sp/f Seytjan**
Boks 127
110 Tórshavn